

## Nærverkið á JobMatch í Keypmannahavn

Á JobMatch-stevnuni, sum verður á Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn fríggjadagin 26. og leygardagin 27. september 2008, fer Nerverkið at dyrgja eftir nýggjum starvsfólkum. - Vit hava ein bás á framsýningini, har høvi verður at hitta starvsfólk frá ymisku deildunum, og kl. 13.00 báðar dagarnar verður áhugaverd framløgu um nógvu ymisku starvsmøguleikarnar í Nærverkinum, sigur Nærverkið í tíðindaskrivi. Nærverkið fær í komandi árum at hava tørv á nógvum starvsfólkum, og tey vóna, at JobMatch fer at vekja áhugan hjá útisetum og dønum við røttu útbúgvingunum at koma heimaftur á klettarnar.

# Filmslistarlig vika í Norðurlandahúsinum

**Mánadag seinnapart boðaði Norðurlandahúsið til tíðindafund viðvíkjandi Norðurlendsku Filmsvikuni, ið verður hildin 11.-17. oktobur. Nógv nýtt føroyskt tilfar verður at síggja, umframt filmar úr Íslandi, Danmark, Noreg, Svøríki, Finnlandi og ein úr Belgia. Endamálið við filmsvikuni, er at lata eyguni hjá føroyingum upp fyri hini størstu listagreinini í heiminum**

LIST
*Bergur Johannesen*
*bergur@sosialurin.fo*



*Urd Johannesen, Martin Simonsen og Heiðrik av Heygum eru tríggir lyklapersónar á filmsvikuni*

Martin Nolsøe Simsonsen, leiðari í Klippfisk, umtalaði filmslistina, sum tí størstu listagreinina, tí í størst vøkstri og við flest møguleikum.

Ofta verður filmur ikki bundin saman við orðinum list, men heldur undirhald. Nógvar ymiskar greinar eru innan film, heilt frá skemtifilmum til álvarsamar dokumentarfilmar til sjáldsamar løgnar listafilmar – á hvør sín hátt kunnu allir kallast list. Úrvalið av filmum, ið vanligi føroyingurin hevur møguleika at síggja er sera snævurt. Serliga tá hugsað verður um norðurlendskar filmar, sum í hesum døgum eru í øgiligari menning.

Urd Johannesen, ið er verkætlanarleiðari og stigtakari, var fyri ári síðan í Finnlandi, har hon veruliga fekk eyguni latin upp fyri finskum filmum og norðurlendskari filmslist sum heild. Fleiri og fleiri fáa sær útbúgvingar innan júst hetta økið og filmar í hópatali verða framleiddir í grannalondum okkara. Ísland er av álvara komið við uppí leikin, seinastu árini. Nú verða umleið tveir íslendskir filmar framleiddir árliga. Á stevnuni í ár verður íslendski krimi-filmurin frá 2006 »Mýrinn« sýndur. Filmurin er viðurkendur á altjóða støði og er mettur til meir enn 7 stjørnur av 10 møguligum á heimasíðuni IMDb.com. Enska heitið er »Jar City«.



*Heiðrik av Heygum lýsir eina framtíð, har teldur koma at spæla alsamt størri leiklut, í filminum »Mítt Rúm«*

*Mynd úr filminum*

### Hópur av føroyskum tilfari

Tó ikki nógvir spælifilmar eru lætnir úr føroyskum hondum, liggur nógv tilfar, ið hevur uppiborið at síggja dagsins ljós. Martin Simonsen, úr Klippfisk greiddi frá, at í Dansistovuni í Norðurlandahúsinum, har barnafilmar, verða sýndir tíðliga um dagin, verður ymiskt føroyskt tilfar víst.

Sendingin Agurk, ið fekk stóra undirtøku, birti undir nógvum ymiskum hugskotum og filmsskúlin Klippfisk veitir møguleikar hjá flest øllum at menna síni evni.

Nógv evnisrík listafólk hava brúkt tímar inni hjá Klippfisk og fleiri av verkum teirra verða at síggja í filmsvikuni.

### »Mítt Rúm«

Hetta er heitið á einum av mest áhugaverdu útspølunum á filmsvikuni. 24 ára gamli Heiðrik av Heygum stendur aftanfyri stuttfilmin. Hann hevur seinasta árið verið á Kort- og Dokumentarfilmskolen í Keypmannahavn.

Filmurin snýr seg um ein drong, ið kennir ein longsul eftir nærleika. Mamman veit ikki hvat hon skal gera, so hon keypir honum eina teldu. Teldan megnar at uppfylla tørvirnar hjá dronginum. Filmurin er svartur og hvítur, og hevur íblástur frá filmum úr ’50-árunum.

Hugskotið liggur í, at fólk senda meira og meira upplýsningar um seg sjálvi út á alnótina, og við hesum megnar teldan at skapa eina mynd og skilja persónin aftanfyri skýggjan. Filmurin hevur føroyska talu, men enskar undirtekstir, við tí fyri eyga, at hava møguleika fyri at verða nýttur uttanlands.

Framleiðslan er nærum øll føroysk, men ikki lætt var at finna fólk, tí so fá eru, við neyðugu førleikunum. Útgerð og tílíkt var eingin trupulleiki at fáa frá Klippfisk, ið hevur verið honum ein dyggur stuðul.

– Eg hopi at eg kann inspirera onnur ung, segði Heiðrik av Heygum at enda.

### Filmsvikan

Stórar vónir eru fyri filmsvikuni, og fyrireikararnir vænta nógvar gestir. Men mest av øllum at byrja nakað nýtt. Smala úrvalið av filmum, ið føroyingar eru vanir við, verður víðkað nógv og karmarnir veita nakað nýtt og spennandi. Millum filmarnar gera karmarnir í Norðurlandahúsinum tað lættliga møguligt at kjakast og práta um tað, ið hevur verið á skránni. Veruliga endamálið er jú at lata eyguni upp fyri hesi listavinnu og fyri stóra ríkidøminum, ið er at finna her.

Filmsvikan er samstundis sum skúlarnir eru í heystferiu, og hetta vænta fyrireikararnir fer at lokka børn og ung á vitjan. Gjøgnum vikuna ferður farið frá fyrsta degi har Føroyar eiga høvuðsleiklutin, til Ísland eigur hann annan dagin, síðan Noreg, Svøríki, Finnlandi, Danmark og aftur til Føroya.

Fyrsti filmurin verður »Mítt Rúm« hjá Heiðrik av Heygum, og verður sýndur leygardagin 11. oktobur klokkan 19:15.